Fylgiskjal 5

**Annika Petersen**

| | |
|---|---|
| **Fra:** | Ken Nónklett |
| **Sendt:** | 12. februar 2019 15:58 |
| **Til:** | VMR-Journal |
| **Cc:** | Jógvan Thomsen |
| **Emne:** | Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg og í vinnufyritøkulógini til hoyringar (striking av handhavapartabrøvum) |

Til Uttanríkis- og Vinnumálaráðið,

Innleiðandi kann viðmerkjast, at Skráseting Føroya er við í grundardátuverkætlanini hjá Talgildu Føroyum. Ein liður í hesi verkætlan er at gera eina almenna virkisskrá yvir allar eindir í Føroyum (kann samanlíknast við CVR-registeret í Danmark). Í hesum sambandi verður eisini arbeitt við at gera eina eigaraskrá, har bæði løgligir (legalir) og veruligir eigarar skulu skrásetast. Ein partur av hesari skrá verður "lokaður" og ikki almennur. Í hendan partin av skránni skulu eigarar av handhavapartabrøvum niðanfyri 5 % lata seg skráseta. Kravið um slíka skrásetan framgongur av § 57 a í vinnufelagslógini. Henda áseting er ikki sett í gildi enn, men kann setast í gildi við kunngerð.

Sambært uppskotinum er ætlanin, at lógaruppskotið skal koma í gildi 1. januar 2020. Sambært § 49, stk. 2 í uppskotinum kann ein ognari av einum ella fleiri handhavapartabrøvum ikki útinna tey rættindi, sum ein kapitaleigari hevur, uttan so at ognarin er skrásettur í kt-skipan Skráseting Føroya, sbr. § 57 a ella hevur givið fráboðan til felagið um sítt ognarhald sbrt. § 55.

Av tí at § 57 a í vinnufelagslógini ikki er sett í gildi, ber ikki til sum er at fráboða Skráseting Føroya um møguligan ognarskap av handhavapartabrøvum. Neyðugt er, at ásetingarnar um fráboðan av ognarskapi (§ 58 løgligir eigarar, § 58a veruligir eigarar og § 57 a eigarar av handhavapartabrøvum niðanfyri 5 %) verða settar í gildi samstundis, tá kt-skipanin, sum helst verður ment saman við Talgildu Føroyum, er klár. Nær ein slík skipan verður klár er trupult at siga í verandi løtu, men talan er helst um 1-2 ár.

Annars áleggur uppskotið Skráseting Føroya fleiri uppgávur uttan at peningur fylgir við. Raksturin hjá Skráseting Føroya er inntøkufíggjaður og tískil gerst tað avbjóðandi hjá Skrásetingini at røkja sínar uppgávur til fulnar.

Nakað av skrivifeilum eru í uppskotinum

Vinarliga / Best regards

**Ken Nónklett**

Deildarleiðari

Skráseting Føroya

Sigmundargøta 13
Postrúm 264
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel. + 298 35 60 10 / beinl. 35 60 16

**Fra:** Annika Petersen <AnnikaHenrikkaHannaP@uvmr.fo>
**Sendt:** 1. februar 2019 16:36
**Til:** Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; Kundatænastan á TAKS <taks@taks.fo>; Skráseting <skr@skraseting.fo>; Tryggingareftirlitið <tryggingareftirlitid@tryggingareftirlitid.fo>; industry@industry.fo
**Cc:** Sørin Pram Sørensen <SorinPramS@uvmr.fo>; Pól Edvard Egholm <pole@uvmr.fo>; Herálvur Joensen <HeralvurJ@uvmr.fo>

**Emne:** Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg og í vinnufyritøkulógini til hoyringar

Til hoyringarpartarnar.

Viðhefta uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg og í vinnufyritøkulógini verður við hesum sent tykkum til hoyringar.
Hoyringarfreistin er sett til **týsdagin 12. februar 2019.**
Vinaliga sendið møguligar viðmerkingar til uvmr@uvmr.fo

Vinaliga váttið fyri móttøku.

Blíðar heilsanir
Annika Petersen
Uttanríkis- og vinnumálaráðið.